# Virðiligt farvæl




*Út av lagið vánaligi vøllurin á Sevmýri, verður nú enduliga kolldømdur, og mugu tvørámenn framyvir leita sær nýggjar leiðir til sínar heimadystir*

**1. DEILD** Tað er lítið og einki sum bendir á, at TB fer at spæla sínar heimadystir á Sevmýri í 2011. Tvørámenn vunnu stórsigur í seinasta dystinum á gamla graslíkisvøllinum á hesum sinni

Uni Holm Johannesen

Fótbóltssambandið hevur givið tvørámonnum greið boð.

Um graslíkið ikki verður skift, og umstøðurnar kring vøllin verða batnaðar munandi, sleppur TB ikki at spæla sínar heimadystir á Sevmýri í 2011.

Tað er lítið sannlíkt, at felagið fer at gera so ógvusligar ábøtur á vøllin.

Felagið hevur ikki fíggjarliga orku.

### Til Hvalbiar

Jóan Petur Olgarsson, formaður í TB, hevur sagt alment, at leiðslan fer væntandi at spyrja seg fyri í Hvalba, um Royn og tvørámenn kunnu samstarva um grasvøllin í bygdini.

Hin møguleikin er at spæla í Vági.

TB fer at kanna allar møguleikarnar, skrivar heimasíðan hjá tvørámonnum.

– Felagið fer óivað at royna allar møguligar leiðis, áðrenn avgerðin verður tikin. Vit vóna, at tá alt kemur til alt, at hini feløgini vísa Tvøroyrar Bóltfelag vælvild, eins og vit altíð hava roynt at vísa øðrum, skrivar heimasíðan.

TB vann 5-1 móti næstbesta liðnum hjá NSÍ í seinasta landskappingardystinum á gamla graslíkisvøllinum.

Fótbóltsfelagið á Tvøroyri er eitt stórt felag við stórari ungdómsdeild, og tí verður spurningurin, um vøllurin í Hvalba, ella í Vági, kann hýsa øllum fótbóltsspælarunum á Tvøroyri.

*uni@sosialurin.fo*

# Tríggir føroyingur vunnu gull

Tríggir føroyingar endaðu ovast, tá »North Atlantic Open 2010« var í vikuskiftinum.

Badmintonsamband Føroya var í farnu viku vertur fyri venjingarlegu há fremstu ungdómsleikarunum í Føroyum, Íslandi og Grønland. 24 spælarar og níggju venjarar hava vant undir leiðslu av Bjarne Nielsne, sum er dagligur leiðari av Top-Direct Badmintonakademinum í Hillerød.

Legan var partur av størri verkætlan hjá evropeiska badmintonsambandinum, ið hevur sum endamál at menna ítróttina í Evropa.

Legan endaði við stórari kapping um vikuskiftið. »North Atlantic Open 2010« gav øllum høvi at síggja sterkastu ungdómsleikarararnar í norðuratlanshøvum í ár. Tað var spælt í aldursbólkinum U13, U15 og U17 í einmansleiki, tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki.

Bartal Poulsen, VÍF, vann í Men's Single U13, og í Dame-double U17 vunnu Rannvá Djurhuus Carlsson og Helena S. Lamhauge úr HBF.

Ísland vann flestu kappingarnar. Íslendingar vunnu 11 av teimum 15 kappinginum í einmansleiki, tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki.

*-uni*




*Vinnarirnir av 1. deild 2010 og uppflytarar: 07 Vestuur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Jens Erik heldur fram

**FÓTBÓLTUR** 42 ára gamli Jens Erik Rasmussen hevur skotið flest mál í næstbestu deildini í ár. Hann hevur verið ein av mest eyðsýndu monnunum hjá 07 Vestur, og hann fer nú at fyrireika seg til aftur eitt kappingarár millum teir bestu í Føroyum

Uni Holm Johannesen

Aftur eitt gullheiðursmerki legðist afturat rúgvuni hjá Jens Eriki Rasmussen um vikuskiftið.

Hann hevur átt týðandi leiklut í uppflytingini hjá 07 Vestur í ár. Bóltsnillingurin hevur verið liðskipari hjá vágamonnum, sum tryggjaðu sær gullmerkini leygardagin.

Jens Erik Rasmussen hevur spælt allar dystirnar hjá 07 Vestur í hesum kappingarárinum.

– Eg ætli mær at halda fram, so leingi hugurin er til tað, og eg eri førur fyri at spæla. Tað eri eg framvegis, so eg fari nú at fyrireika meg til kappingarárið í Vodafonedeildini, sigur Jens Erik Rasmussen.

### Ungt lið

Jens Erik Rasmussen hevur roynt nógv sum fótbóltsspælari.

Hann hevur spælt við MB, HB, FS Vágum, TB, B36, SÍ, og seinastu trý árini hevur hann umboðað 07 Vestur.

Rasmussen er eisini skrásettur fyri 25 altjóða landsdystir og tvey mál.

Nú er hansara uppgáva at hjálpa teimum ungu vágamonnunum, sum ætlandi skulu mynda felagið í framtíðini.

– Tað eru fleiri ungir og dugnaligir spælarar, sum helst fara at gera seg galdandi í framtíðini. Tað sær spennandi út, sigur Jens Erik Rasmussen, sum skeyt tvey av málunum, tá 07 Vestur vann 4-0 móti Víkingi. Bæði vóru við brotsspark i.

Jens Erik Rasmussen er ikki bilsin av, at liðið vann næstbestu deildina í ár, framman fyri KÍ og TB, sum vóru skýrd av hava góðan møguleika at vinna gullmerkini.



*Aldursforsetin, Jens Erik Rasmussen, heldur fram so leingi hugurin er til tess*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Vit hava gjørt stór framstig gjøgnum kappingina, og tað er uppiborið, at vit eru fremstir. Vit hava verið støðugir, og stigatalvan prógvar, at vit hava verið bestir, vísir Jens Erik Rasmussen á.

## FAKTA:

**Navn:** Jens Erik Rasmussen
**Felag:** 07 Vestur
**Pláss:** Miðvøllur og framherji

**Yrkisleið:**
1991: MB, Vdf., 11 dystir / 3 mál
1992: HB, Vdf., 14 d. / 3 mál
1993: MB, 1. d., 18 d. / 12 mál
1994: FS Vágar, 1. d., 12 d. / 10 mál
1995: FS Vágar, Vdf., 1 d. / 1 mál
1995: TB, Vdf., 11 d. / 3 mál
1996: FS Vágar, Vdf., 24 d. / 11 mál
1997: HB, Vdf., 24 d. / 14 mál
1998: HB, Vdf., 28 d. / 6 mál
1999: HB, Vdf., 27 d. / 7 mál
2002: FS Vágar, 1. d., 27 d. / 14 mál
2003: FS Vágar, Vdf., 25 d. / 4 mál
2004: B36, Vdf., 12 d. / 2 mál
2005: SÍ, 2. d., 16 d. / 14 mál
2006: SÍ, 1. d., 20 d. / 5 mál
2007: SÍ, 1. d., 27 d. / 8 mál
2008: 07 Vestur, 1. d., 28 d. / 21 mál
2009: 07 Vestur, Vdf., 26 d. / 12 mál
2010: 07 Vestur, Vdf., 28 d. / 17 mál

*kelda: faroesoccer.com*

### 07V - VÍK 4-0 (3-0)
Dómari: Rói Jacobsen
1-0: Jens E. Rasmussen, brts., 34.
2-0: Johan Ejvind Mouritsen, 39.
3-0: Jens E. Rasmussen, brts., 45.
4-0: Sigtór A. Petersen, brts., 90.

### KÍ - B68 3-0 (2-0)
Dómari: Bárður Mortensen
1-0: Bárður J. Heinesen, 31.
2-0: Sørmundur Kalsø, 38.
3-0: Sørmundur Kalsø, 77.

### EB/S - AB 2-0 (1-0)
Dómari: Alex Troleis
1-0: Hallur E. Fláaberg, 7.
2-0: Halldórur Joensen, 59.

### TB - NSÍ 5-1 (3-1)
Dómari: Ransin N. Djurhuus
0-1: Sonni L. Petersen, 20.
1-1: Dan Mortensen, 23.
2-1: Petur Mortensen, 25.
3-1: Teitur Justinussen, 34.
4-1: Hanus Mortensen, 72.
5-1: Heini Mortensen, 89.

### HB - FCH 1-2 (0-1)
Dómari: Dagfinn Olsen
0-1: Jákup Petur Eliassen, 40.
1-1: Christian Eli Zachariassen, 64.
1-2: Jóhannes Færø, 84.